


**Skái uttan skuldarkenslu**
Eydnan er ikki altíð bara við endan á tunlinum; tað skal eisini bera til at njóta lívið á stundum møðsomu leiðini til munnan. Við hesum í huga bjóðar Føroya Banki sethúsakundum at velja sær skáa onkrastaðni í lánstíðini. Men hetta er eingin vanligur skái. Velur tú at fáa ella leggja um til SkáaLán, fært tú eina munandi rentulækking við í keypið.

**Smíða tær títt egna rásarúm**
Við SkáaLáni fært tú sum sethúsakundi fult frælsi at snikka saman títt egna rásarúm. Tú kanst velja fullan skáa og sostatt sleppa undan at rinda bæði rentu og avgjald. Fullan skáa kanst tú hava í minsta lagi ein mánað og í mesta lagi eitt ár fyri hvørji trý lánsár uttan skáa. Umframt hetta kanst tú velja avdráttarskáar eftir vild og harvið bara rinda rentu men ongan avdrátt í mesta lagi í trý ár.

**Útseting við innbygdari rentusparing**
Við SkáaLáni útsetur tú rentu og avdráttir eftir vild. Men vit geva tær meira enn hetta: Velur tú SkáaLán, fært tú altíð serliga lága rentu á 1. veðrættarlánum. Rentan á vanligum 1. veðrættarlánum er óbroytt 4,25%. Men velur tú SkáaLán, verður rentan einans 3,85%. Hesari serrentu fært tú fullan ágóða av, hóast tú ikki brúkar nakran skáa.
Støkk inn á gólvið og fáa eitt skáaprát við ráðgeva tín í Føroya Banka. So fært tú sjón fyri søgn um, at vit geva tær betri ráð!

**Við SkáaLáni kanst tú:**

- leggja dustfalnar útbúgvingardreymar framaftur
- seta meira av til eftirløn
- reisa húsini av nýggjum
- ganga heima eina tíð
- renna ta dýru skuldina á dyr
- flúgva avstað við allari familjuni

FØROYA BANKI
www.foroyabanki.fo